# Sorgblítt farvæl við Kaffivognin

**Elin Hammer, ið seinastu 18 árini hevur rikið Kaffivognin á kaiini sigur,
– Eg havi selt fleiri hundrað plattar av pylsum og kaffipakkum. Tað er avgjørt við sorgblídni, eg sigi farvæl, men eg havi brúk fyri at taka mær av løttum í eina tíð**

*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*

Elin Hammer hevur seinastu 18 árini starvast í Kaffivogninum á Kaiini. Í dag er seinasti arbeiðsdagurin hjá henni, og í morgin taka nýggju eigararnir, Rannvá Leonson og dótturin Leona Nielsen, við at reka Kaffivognin.

Tað var ein heldur syrgin Elin Hammer, ið Sosialurin hitti í Kaffivognunum á kaiini í morgun. Á borðinum stóð ein risastór lagkøka við tekstinum: 'takk fyri góð og hugnalig ár', ið Elin av sínum eintingum hevði keypt til allar teir 70 kaffivinirnar, ið dagliga hava sína gongd í Kaffivogninum:

– Kaffivognurin á kaiini hevur verið mítt lív seinastu 18 árini. Eg havi verið her, síðan eg var 10 ára gomul. Nú eri eg troytt av tí, og havi hug til at royna okkurt nýtt. Í fyrstu atløgu havi eg ikki nakrar størvegis ætlanir. Eg fari bara heim at slappa av, vera um mannin og njóta summarið, greiðir Elin frá..

Og hon ásannar somuleiðis, at hesi árini í Kaffivogninum hava verið strævin:

– Eg havi jú verið bundin 100 % at Kaffivognum sjey dagar um vikuna. Um eg onkuntíð veruliga havi ynskt at havt frí eitt vikuskiftið, havi eg verið noydd at ríma av landinum.

Men hóast Elin Hammer ikki angrar, at hon hevur selt kaffivognin, veit hon tó við vissu, at hon fer at leingjast eftir trygga og góða arbeiðsplássinum á kaiini,

– Eg fari at sakna kaffivognin og fittu, prátingarsomu arbeiðsmenninar sera, sera nógv. Eg kenni allar teir umleið 70 menninar, ið trúfastir koma hvønn tann einasta morgun til kaffi. Ongin teirra nýtist at siga, hvat teir skulu hava – teir koma bara inn um hurðina og seta seg niður. Eg veit akkurát, hvat hvør einstakur vilja hava.

Tíðarskeiðið Elin hevur arbeitt í Kaffivogninum hevur havt ómetaliga stóran týdning fyri hana:

– Eg eri at kalla uppvaksin her. Hesi árini eri eg eisini komin at kenna nógv fólk og havi fingið nógvar sera góðar vinir fyri lívið. Hetta er eitt einastandandi umhvørvi, ið eg fari at sakna ovurhonds nógv. Men nú má tað verða mín túrur at drekka kaffi her um morgnarnar, sigur Elin at enda.



*– Takk fyri góð og hugnalig ár, stendur á lagkøkuni, ið Elin Hammer hevði keypt til allar kaffivinirnar hjá sær*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Vit hava havt okkara dagligu gongd í Kaffivogninum síðan 1965. Tá hann stóð mitt á parkeringsøkinum á Farstøðini. Tað siga pensjónistarnir Tórólv Fagradal og Kristin Gærdbo. Við borðið sita eisini Elin Hammer, vinstrumegin, og starvsfelagi hennara, Maria Sivertsen*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# – Vit fara at sakna Elina

**Seinastu nógvu árini hava áleið 70 arbeiðsmenn og pensjonistar hvønn morgun havt sína dagligu gongd í Kaffivogninum á kaiini og fingið sær kaffi frá Elini**

FÓLKALÍV
*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*

Pensjonistarnir Tórólvur Fagradal og Kristin Gærdbo koma trúfastir, hóast tað er kavi, vindur ella regn, í Kaffivognin hvønn morgun at fáa sær kaffi. Teir harmast báðir um, at Elin Hammer nú gevst at arbeiða í Kaffivogninum:

– Elin hevur altíð verið góð við okkum og veitt góða tænastu. Vit fara avgjørt at sakna hana, men vóna, hon kemur at vitja okkum av og á.

Tórólvur og Kristin hava havt sína dagligu gongd í Kaffivogninum síðan 1965. Tá stóð Kaffivognurin mitt á parkeringsøkinum á Farstøðini:

– Vit eru nógvir, ið savnast her hvønn morgun. Vit sita her í um 1-2 tímar og drekka kaffi, práta um politik, arbeiði, konufólk og annað. Síðan hitta vit eisini arbeiðsmenninar, ið fortelja okkum dagsins tíðindi, áðrenn vit fara út til dagsins verk, ið vanliga er at geva kríatúrum, at pumpa bát og annað húsarbeiði.

Tórólvur og Kristin vóna, at Kaffivognurin fer at halda á fram at vera eins hugnaligur, og hann er nú:

– Hetta er eitt gott umhvørvi at vera í. At kalla rættiliga familjukent, tí øll kenna hvønn annan.